# Jólaskipið kemur til Klaksvíkar

Í morgin mikudagin kl. 18 kemur Jólaskipið á Klaksvíkina við nógvum jólamonnium og næstan 2000 pakkum til spentu klaksvíksbørnini.

Tað er eingin ivi um, at veitslurómur verður í Klaksvík, tá skipið leggur at á Stongunum. Vanliga plaga eini 3000 fólk at taka ímóti skipinum og hetta er altíð stak hugnaligt. Tað er altíð ein vøkur sjón, tá Jólaskipið stevnir inn skrýtt við blussum og faklum.

Jólamenninir, nissur á hestbaki og Klaksvíkar Hornorkestur fara síðan í skrúðgongu heim á vøllin, har borgarstjórin bjóðar vælkomin. Birgir Sigurðsson og vinfólk skipa fyri sangi, og eisini verður felagssangur.

Hetta er fimtanda árið á rað, at Klaksvíkin fær vitjan av jólaskipinum. Hetta var eitt av fyrstu plássunum har Jólaskipið gjørdist ein verulig risahending. Á hvørjum ári gleða børn og vaksin seg nógv til hesa hending, ið veruliga setur jólini í gongd ikki bara í Klaksvík, men í øllum Norðuroyggjum.




























